# Tann tigandi kollveltingin

**Tann stóri studningurin frá stórfyritøkum til politiskar flokkar at brúka í valstríðnum er eitt álvarsmál, skrivar Noreena Hertz. Hví hava flokkarnir brúk fyri so nógvum pengum? Jú, tann hugsjónarligi munurin er mestsum horvin, og tí noyðast flokkarnir at útgreina munin gjøgnum marknaðarføring og penganýtslu. Dagsins politikkur styðjar seg meir og meir til fjølmiðlasamskifti gjøgnum sendingar og reklámur. Lýsingar í bløðum, í tíðarritum, reklamufilmar á kaðal- og fylgisveina-TV og Internetið eru leiðirnar at fáa fatur á einari veljarafjøld, sum gerst alsamt støðuleysari. Uppundir amerikanska forsetavalið í 2000 tjentu sjónvarpsstøðirnar 600 mió. dollarar. Síðani 1990 hava reklama og PR eisini verið natúrligur partur av valstríðnum í Bretlandi.**

**Flokkarnir brúktu eina miljard dollarar til forsetavalið í USA í 2000. Men tað kostar eisini at koma í kongressina. Ein sessur í senatinum kostar í miðal 6 mió. dollarar. Hetta merkir sjálvandi, at tað eru bara tey ríku, sum kunna gerast senatslimir. Ein brúkti 36 mió. dollarar fyri at fáa ein senatssess. Ein annar 50 mió. dollarar úr egnum lumma fyri at gerast borgarstjóri í New York. Og ein triði brúkti 30 mió. dollarar úr egnum lumma, tá hann royndi at gerast senatorur fyri Kalifornia, men tapti valið. Hvussu kann eitt val vera frælst og rættvíst, tá bara tey múgvandi kunna stilla upp?**



*Misnøgdin heldur fram at bólgna í einum heimi, har borgararnir ikki hava rættindi, staðfestir Noreena Hertz*

**4. og seinasti partur**

VINNUBÓKMENTIR

*Finnbogi Ísakson*



Hetta er ikki eindømi fyri USA. Upphæddirnar eru smærri, men gongdin tann sama aðrastaðni. Í Bretlandi brúkti Labour 27 mió. pund uppundir valið í 1997 og teir konservativu 28,5 mió. pund. Stjórnin hjá Tony Blair hevur fingið eina lóg samtykta, sum setir 20 mió. pund sum hámark fyri, hvat ein flokkur kann brúka í valstríðnum eitt valár. Á Teivan rindaði Guomintang veljarum millum 15 og 45 dollarar fyri at koma á valfund uppundir forsetavalið í 2000.

Støddin á valfíggjarætlanunum er ein trupulleiki. Peningurin kann ikki longur fáast inn gjøgnum limagjald, úr fakfelagsgrunnum ella við persónligum stuðuli. Heldur ikki almennur stuðul, har slíkur verður latin, røkkur til. Tí venda politikararnir sær sjálvandi til vinnulívið fyri at fáa nóg nógvan pening at ráða yvir. Um allan heim, úr Moskva til Paris, úr Washington til London, fíggja stórfyritøkur og handilsmenn valstríðið hjá politikarum og politiskum flokkum.

### Pengar og fjølmiðlar

Gevararnir eru fáir. Eitt fjórðings prosent av amerikanska fólkinum gav flokkunum ein dollara ella meir til valstríð í 1995/96, hini gávu einki. 500 tær størstu fyritøkurnar gávu flokkunum 260 mió. dollarar frá 1987-96. Sjálvandi geva stórfyritøkurnar einki uttan at fáa okkurt afturfyri. Tær rokna við, at stuðulin kastar væl av sær. Sum hægstarættardómarin David Souter tók til: *"Tað er líkt til…, at stórir styrkveitarar fáa betri tænastu frá politikarunum enn smáir styrkveitarar, og so er ikki um at tala tey, sum einki lata…"*

Stuðulin, sum verður veittur flokkunum í Amerika, er lógligur. Verri er statt í Evropa, har reglur eru í fleiri londum fyri stuðli til politikarar og flokkar. Vit hava hoyrt um Helmuth Kohl í Týsklandi, men rok hevur eisini verið í Spania og Belgia. Og í Fraklandi gávu fyritøkur øllum leiðandi politiskum flokkum so nógvan ólógligan pening, at í 1993 varð sett fullkomið forboð fyri, at vinnulívið kundi veita flokkunum stuðul. Í Italia hevur skilið verið so ringt, at fyrst í 1990-unum vórðu kanningar av korrupsjón gjørdar móti 40% av parlamentslimunum. Í Japan noyddist liberaldemokratiski flokkurin, sum hevði stýrt í 38 ár, at lata valdið frá sær í 1993 orsakað av korrupsjón. Fíggjarligt skittføri var ein av orsøkunum til, at Konservativi Flokkurin í Bretlandi tapti fyri Arbeiðaraflokkinum.

Antin tað kann prógvast ella ikki, so er tað vist, at stórfyritøkur og handilsmenn við peningaligum stuðli vilja vissa sær, at politikararnir í minsta lagi lurta eftir teimum, tá avgerðir skula takast. Hví skuldi vinnulívið brúkt hesar pengarnar, roknaði tað ikki við, at tað fekk nakað burtur úr tí?

Politikarar hava ikki bara brúk fyri pengum frá vinnulívinum, men eisini innivist í fjølmiðlunum. Ein góð oddagrein ella eitt innslag í sjónvarpstíðindunum um kvøldið gera, at ein politikari fær orðið á túsundtals ella miljónir av fólki gjøgnum ein miðil, sum fólk hava størri álit á enn goldnum lýsingum.

Í Bretlandi eigur fjølmiðlakongurin Rupert Murdoch bløðini Sun og The Times og News Corporation, sum hevur ræðið á 30% av bretska upplagnum av avvísum. Murdoch hevur so stórt vald, at fyrst fríggjaðu teir konservativu til hansara og síðani Arbeiðaraflokkurin. Tað sigst, at tann tiltikni spinndoktarin hjá Tony Blair, tann nú fráfarni Alastair Campbell, tók ikki av at gerast tíðindaskrivari hjá nýggja floksleiðaranum í 1994 uttan so, at Blair játtaði at lesa nøkur "skjøl" ígjøgnum. Hesi skjølini vóru forsíður í Sun uppundir tvey tey undanfarnu valini, sum Labour tapti. Allar forsíðurnar styðjaðu teir konservativu. Á einari forsíðu var yvirskriftin: *"Tað var Sun, sum vann!"*, tá Neil Kinnock hevði tapt í 1992. Campbell gjørdi tað greitt fyri Blair, at hann vann ikki, uttan hann fekk Murdoch í part við sær.

Blair fekk samband við Murdoch, sum bað hann halda talu á síni árligu ráðstevnu, sum í 1995 var hildin á Hayman Island úti fyri Avstralia. Ongin avtala varð gjørd, men fáur ivast í, at Murdoch fekk at vita, at Arbeiðaraflokkurin fór ikki at nerta hansara fjølmiðlaríki. Seks vikur undan valinum í 1997 gjørdi Sun eitt søguligt skifti og segði sínum 4 miljónum lesarum, at *"Sun styðjar Blair"*.

Ein fyrrverandi blaðstjóri á The Times hevur sagt, at Murdoch styðjaði Margaret Thatcher, og at tey prátaðu javnan saman. *"Vit kalla hann ofta í skemti "harra forsætisráðharri", men tað er ikki bara skemt longur. Á mangan hátt er hann landsins spøkilsis-forsætisráðharri."*

### Mótmæli og boykott

Í heiminum við Teirri Tigandi Kollveltingini halda nógvir borgarar, at staturin røkir ikki teirra áhugamál longur, og teir ansa tí meir og meir eftir sær sjálvum. Fólk fara beinleiðis til tann, sum tey halda kann gera nakað, nevniliga stórfyritøkurnar. Tað verður gjørt við at mótmæla. Mótmæli førdu til, at Monsanto, heimsins størsti framleiðari av genviðgjørdum fræi, var um at fara á húsagang.

Báðu megin Atlantshav fylkjast fólk og hótta við boykotti og negativari umtalu fyri at fáa fyritøkur at broyta handilspraksis og fyri at vísa á veikleikar í sjálvari skipanini. Stjórnirnar umbera seg við, at globaliseringin avmarkar teirra virkisfrælsi, og at neyðugt er at hava búskaparligan vøkstur. Fólkið skilir hetta, sum at stjórnirnar svíkja tað eftirlit, tær eiga at hava við, hvussu fyritøkurnar vinna pening, og fólkið tekur tí sjálvt róður í hond. Minkandi áhugi fyri politikki merkir ikki, at áhugin fyri samfelagnum er minkaður. Grasrótarørslurnar mennast, meðan limatalið í politiskum flokkum minkar. Prosentparturin av amerikanarum, sum eru uppi í stríðnum fyri nærumhvørvinum, trífaldaðist í nítiárunum. Í 2000 vísti ein amerikansk meiningakanning, at 25% av amerikanarum vóru til reiðar at vera við í einum boykotti í onkrum ávísum máli – ein vøkstur uppá 50% eftir 10 árum.

Í 1995 vildi Shell sleppa sær av við tann útslitna oljuboripallin Brent Spar í Norðsjónum. Hann varð sleipaður út á djúpt vatn í Atlantshavinum, har ætlanin var søkkja hann. Almenna hugsanin noyddi Shell í staðin at toga skipið inn á norskan fjørð, har hann varð tikin sundur. Greenpeace og fjølmiðlarnir stóðu saman um at mótmæla. Umsitingarstjórin hjá Shell, Herkstroter, segði tá:

*"Vit tóku avgerðir, sum vit aftaná sóu vóru skeivar. Vit vóru trekir at skilja, at umhvørvisfelagsskapir, brúkarasamtøk og so framvegis vóru í ferð við at fáa makt. Samstundis vóru teir, sum vit plagdu at halda okkum til [almennir stovnar og vinnustovur] í ferð við at missa makt".*

Víða um tóku fólk undir við mótmælunum. Týskir brúkarar boykottaðu bensinstøðirnar hjá Shell – tann eina dagin fall sølan 50%. Umdømið hjá Shell versnaði. Konservativa bretska stjórnin royndi at sannføra fólk um, at loysnin, sum Shell hevði valt, var tann, sum skaddi umhvørvið minst. Noreena Hertz skrivar, at í hesum førinum vísti tað seg, at Shell og stjórnin høvdu rætt, men tá var ov seint til, at Shell slapp undan skaða.

Umframt at fara uttan um politisku skipanina í umhvørvismálum, tóku brúkararnir seg eisini saman um viðurskiftini í handilslívinum. Shopping – tað at keypa – fekk so við og við størri moralskan týdning. Teir nýggju katedralarnir hjá miðalstættini eru handilsmiðstøðir við stórum parkeringsplássum. Forbrúkararnir krevja etiskan handil, og tað er eitt sjónarmið, sum eisini enska kirkjan tekur undir við. Í nýggju bønarbókini New Start Worship fáa tey trúgvandi hesi ráð:

*"…hvar vit keypa, hvussu vit keypa og hvat vit keypa er ein livandi fráboðan um, hvat vit trúgva uppá… Shopping, sum fær kundan at gera etiskar og trúarligar metingar, kann vera nærri teirri tilbiðjan, Gud vil hava, enn nógvar frómar bønir í kirkjuni… Taka vit leiklutin sum Guds tænarar í álvara, eru tey, sum keypa, tilsamans ein óføra sterkur bólkur…"*

Tað næsta brúkaratiltakið var at gera vart við, hvussu vøran varð framleidd. Í apríl 1996 varð amerikanski almenningurin skelkaður, tá tað kom fram, at ungfólk í Honduras, summi ikki meira enn 13 ára gomul, seymaðu Wall Mart-klædnavøruna Kathie Lee. Tey arbeiddu 20 tímar um samdøgrið fyri 2 kr. um tíman. Tann best umtókti talkshowverturin Kathie Lee Gifford fekk 5 miljónir dollarar um árið afturfyri, at plaggið hevði hennara navn. Hon skar útúr at gráta, tá hon á landsumfevnandi sjónvarpi fekk at vita um skilið. Saman við øðrum fór hon í hernað móti Wall-Mart og øðrum klædnaframleiðarum, sum misbrúktu ung og børn í

*Framhald á næstu síðu*